

Nakrir av leikarunum hjá ÍF Føroyum undan venjingini ein kaldan várdag í umklæðingarrúminum á Kløvermarkini úti á Amager

Mynd: Rólant Waag Dam

# ÍF Føroyar hevur ikki havt betri grundvøll

**Ongantíð áður hevur ÍF Føroyar havt so gott leikaragrundarlag, sum felagið hevur í ár. Tað metir leikandi venjarin, Eyðun Hentze Højgaard, ið saman við hinum venjarum felagsins hevur havt nærum hálvthundrað mans til venjing hvørja ferð, vant hevur verið í ár**

Kvalitetur og kvantitetur eru ikki tveir faktorar, ið eru treytaðir av hvørjum øðrum. Men í ÍF Føroyum hava venjararnir bæði góðsku og mongd, tá teir skulu seta tey trý liðini, sum felagið hevur meldað til kappingar í ár.

– Fyri fáum árum síðani høvdu vit eitt lið, sum kappaðist í toppinum á Keypmannahavnarseriuni. Liðið, vit hava í dag, er á sama støði sum tað liðið. Sjálvur hópurin er enn tá breiðari nú, so leikaragrundarlagið er tað besta nakrantíð. Men um liðið er tað besta nakrantíð, síggja vit fyrst, tá tað kemur undir trýst og sálarligi parturin eisini verður royndur, sigur Eyðun Hentze Højgaard, leikandi venjari hjá ÍF Føroyum. Saman við Sigmundi Mikkelsen hevur hann, annað árið á rað, ábyrgdina av besta mansliðnum hjá ÍF Føroyum.

Tvey onnur lið manslið eru eisini, sum Uni Leitisstein Hansen, Eirik Hammer og Jón Henriksen taka sær av í felag. Harumframt manna kvinnurnar eisini eitt lið, og hesar hava Andras K. Thomassen sum venjara.

Tilsamans hava umleið 60 mans víst seg til venjing í ár, meðan kvinnurnar hava akkurát nóg mikið av fólki til at manna eitt lið.

**Spennandi ár**

Fótbóltsárið hjá føroyska ítróttarfelagnum í Keypmannahavn, verður skjótt av álvara bríksláð í gongd. Í hálvantriðja mánað hava menn vant, og Eyðun Hentze Højgaard gleðir seg til kappingarárið byrjar.

– Hetta verður eitt ógvuliga spennandi ár. Vit vita, at okkara lið er rættiliga gott samanborið við undanfarin ár, men tað eru fleiri sterk lið í okkara deild, so vit hava ikki nakran málsetning, sum eitur, at vit skulu flyta upp, ella at vit skulu vera millum trý tey fremstu liðini, greiðir Eyðun Hentze Højgaard frá.

Hann ivast í, um yvirskipaðir málsetningar fyri sjálva kappingina tæna hansara liði nakað.

– Tað er ikki optimali mátin at fyrireika eitt lið til kappingárið. Vit leggja fokus á sjálvar fyrireikingarnar og tað arbeiðið, ið liggur í at fáa eitt lið klárt, fortelur Eyðun Hentze Højgaard.

Higartil hevur hesin leistur roynst væl, og í venjingardystunum hevur tað sæð heilt gott út hjá besta mansliðnum hjá ÍF Føroyum.

– So um vit halda áfram við sama spæli og somu úrslitum, skulu vit nokk enda millum tey fremstu í deildini, sigur leikandi venjarin.

**Framhald á síðu 40**